
LM-071/2023

Fylgiskjal 3

KAMPUS FRÆLSI

NÝGGJUR FELAGSBYGNINGUR TIL FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



UPPSKOT 78921

LM-071/2023

LM-071/2023

INNIHALD

Visjón - Arkitektonisk hugsjón og dygd	3
Býlingurin	4
Skipan av økinum	10
Langveggir/útveggir	13
Timbur konstruktiónin	13
Funktionalitetur	13
Skipan av bygningi	16
Virkis og rørslu diagram	18
Burðardygd	21
Visjón - Landslag	26
Grønir fyrimunir	27
Uppskot Landslag	28
Mikroklimatiskar kanningar	30
Flatmynd	34
Skurðir	36
Framsíður	39
Høvuðstekningar	42

KAMPUS

INNLEIÐING

Vit vilja fegin takka fyri høvið at koma við uppskoti til hesa verkætlan. Tað skerst ikki burtur, at ein víðkan av møguleikum fyri hægri lesnaði Føroyum er avgerðandi og ein sera týdningarmikil hornasteinur undir eini burðardyggari menning av føroyska samfelagnum.
Somuleiðis síggja vit tað sum eitt stórt og gott framstig, at avvarandi myndugleiki hevur gjørt av at menna økið millum Frælsið og Debesartrøð. Í fleiri umførum hava aðrar staðsetingar til eitt framtíðar Kampus verið umrøddar, millum annað uttanfyri býin við Oyggjarvegin. Eftir okkara tykki er eingin ivi um, at rætta avgerðin er at menna framtíðar Kampus hjá Fróðskaparsetrinum á hesum øki, millum Frælsið og Debesartrøð. Eitt øki við stórum menningarmøguleikum til frama fyri bæði Setrið og fyri at gerast ein livandi partur av miðbýnum og eini framtíðar menning við Vestaru bryggju og økinum við Landsjúkrahúsið. Ein sera góð byrjan á hesi menningarleið má sigast at vera hendan ætlanin við einum felagsbygningi – einum dukandi hjarta í Nóatúni.

VISJÓN - ARKITEKTONISK HUGSJÓN OG DYGD

Útgangsstøðið fyri einum felagsbygningi og einum framskygdum framtíðar Kampus í Føroyum skal vera eitt kveikjandi og mennandi umhvørvi fyri lesandi, undirvísarar, starvsfólk og vitjandi. Eitt opið umhvørvi, har akademisk dygd er í hásæti og á einum sovorðnum støði, at tað dregur bæði føroysk og altjóða lesandi, undirvísarar og granskarar til sín.
Tá hugt verður at nýggjari lestrar- og kampusumhvørvum í altjóða universitetsheiminum, so eru ynskini mangan meinlík við yvirskriftum so sum:

- Høg arkitektonisk góðska
- Fleksibilitetur
- Karmur um góðan trivnað
- Gott og varierandi óformelt lestrarumhvørvi
- Góð og væl útgjørd bólka- og undirvísingarrúm
- Framkomið bókasavn/mediatek
- Kveikjandi felagsøkir við matarsali, kaffikrókum og hugnaligum savningarstøðum
- Fleksibult og tignarligt høvuðsauditorium
- Burðardygt framskygni

Hesi eru øll viðurskifti, ið vit í øllum lutum leggja okkum eftir at loysa á allarbestan hátt – við nærlagni í rúmligum samanhangum, góðum og vælskipaðum planloysnum, tilknýti millum úti- og inniøkir, dygdartilfarið og rúmligum upplivingum.

Tá arbeitt verður við eini verkætlan sum hesari, so lærir tú skjótt, at afturat hesum omanfyrinevndu tættum, eru fleiri høvuðstættir afturat, ið krevja serliga viðgerð. Í flestu førum tættir, ið skulu skilmarka samleikan hjá júst hesum universiteti; hjá framtíðar Fróðskaparsetri Føroya! Onkur vildi uttan iva ført fram, at tað ikki er tørvur á einum byggilistarligum samleika, men at samleikin skal spetta úr tí innihaldi og fyritaksemi, ið fer fram á Setrinum. Hetta er uttan iva ein vegur at fara, og tað finnast ein ørgrynna av universitetum og kampusumhvørvum kring heimin, har hendan allýsingin er hóskandi. Vit halda tó, at miðast skal ímóti einum enn hægri máli, har nýggi samleikin er samansettur av fleiri tættum. Innihald og fyritaksemi er sjálvandi meginbulurin, men afturat hesum skal leggjast ein íblástur, ið sprettir úr lokalari siðvenju. Vit vilja tí skapa eitt Setur, ið fer at liggja í allarfremstu rað millum lærustovnar úti í verð, samstundis sum tað er sprottið úr einum lokalum søguligum og mentanarligum jørðildi.
Umframt tey evni, ið eru reksaði upp omanfyri, lýsir byggiskráin harafturat fleiri evni, ið somuleiðis kunnu hava leiklutin sum grundarsteinar undir einum sterkum staðbundnum samleika:

- Felagsbygningurin skal savna Setrið
- Tað dukandi hjartað á Setrinum
- Ein vitanarviti í Norðurhøvum
- Felagsbygningurin skal binda nærverandi býarumhvørvið saman

Hetta er eitt gott grundarlag undir skapanini av einum serstøkum samleika, ið tekur støðið í tí staðbundna. Tó halda vit sum nevnt, at visjónin kann og skal víðkast.
Tann fyrsti spurningurin, vit settu okkum í sambandi við hesa verkætlan var: Hvussu skapa vit eitt nýmótans FØROYSKT, burðardygt universitet, ið sjálvandi skal innskriva seg í ein altjóða samanhang og taka krøvini í byggiskránni í álvara?

Vit meta, at tað hevði verið sera spennandi, um ein søguligur og lokalur íblástur kundi verið ein yvirskipað drívmegi handan skapanina av komandi høvuðsbygninginum á Setrinum. Tað eru serliga tvey søguevni, sum vit hava tikið støðið í; nevnliga tí siðbundna føroyska býlinginum og tí aldargamla langhúsinum frá víkingatíð. Býlingurin verður nýttur sum útgangsstøðið fyri og íblástur til skipania av bygninginum í landslagnum. Í mun til sjálva byggingina hava vit hugt at nøkrum prinsippum í rúmliga langhúsinum, ið á ein hátt hevur leiklutin sum poetiskur íblástur til tilfar, bygnað, rúmligt huglag og sum søgulig tilvísing.

LM-071/2023

BÝLINGURIN

Í byggiskránni eru fleiri ynskir lýst um at laga seg til eitt sera skiftandi grannalag eins og til eitt fjølbroytt lendi. Somuleiðis er ynski um ein bygning, ið tekur hædd fyri uttandura uppihaldsmøguleikum og innliman av grønum útiøkjum í inniumhvørvinum og so framvegis.

Tíverri tykist tað sum, at vit í Føroyum seinastu mongu árini – bæði innan planlegging og bygging – hava gloymt ein stóran part av aldargomlum dygdum. Tað er ikki uttan orsøk, at føroyska bygdalagið og býlingsbygnaðurin gjøgnum øldir hevur ment seg til ein serføroyskan hátt at byggja og at tillaga seg landslag og veðurlag. Tí er tað sárt at sigga, at vit í eini nútíðarmenning av føroyska samfelagnum tykjast ikki at kennast við hesar siðvenjur og dygdir. Okkara uppskot er ikki beinleiðis at kopiera ein aldargamlan byggihátt, men heldur at taka hesar siðvenjur í álvara og tilogna okkum tey prinsipp og ta vitan, ið eru ald her heima ígjøgnum øldir.

Afturat hesum – at taka lokalar siðvenjur í álvara, at nýta tær í einum nútíðar hami og harvið gera okkum dælt av nøkrum prinsippum og eini vitan, ið eru ment til okkara umstøður – so eru vit somuleiðis av tí fatan, at ein tílíkur arbeiðsháttur er eitt gott boð uppá, hvussu eitt nútíðar føroyskt mál fyri planlegging og bygging kann síggja út.

Í skipanini av felagsbygninginum ynskja vit at síggja bygningin sum ein býling og harvið í minni mun sum ein stóran bygning. Vit halda ikki at ein bastantur bygningur, sum til dømis Skúlin á Fløtum ella Glasir, hevði hóskað seg á hesum stað. Munandi meira hóskandi er tað at arbeiða við einum "bygningi," ið er limaður sundur í smærri eindir, soleiðis at hann í størri mun fer at síggjast sum ein Kampus-býlingur við eyðkennum, har ið:

- "Bygningurin" verður liðaður sundur í smærri lonir, ið skapa ein "býling".
- Lonirnar leggja seg náttúrliga eftir skiftandi lendinum.
- Lonirnar bróta niður skala og tillaga seg sera ymisku húsastøddirnar í grannalagnum.
- Ymisku húsini kunna tillagast teir partar av landslagnum, ið vit ynskja at varðveita.
- Skiftandi húsastøddir gera tað møguligt at skapa lívd og góðar krókar kring "býlingin".
- Ymisku lonirnar gera tað ómakaleyst at fáa grøn økir heilt inn í kjarnuna á "bygninginum" og samstundis fáa "býlingin" út í landslagið.
- "Millum húsini" verður ein "almenn" innandura gøta skapt við túnum, skotum og pallum framvið.
- Í miðjuni millum húsini verður stóra Torgið, ið bindur allar meginfunktiónir saman og loyvir grønum uttandura økjum heilt inn í hjartað.


Samanumtikið kann hendan myndin av tættstandandi húsum, ið skapa ein fjálgan býling á heyginum, gerast ímyndin av modernaða føroyska universitetinum í framtíðini.

LANGHÚSIÐ OG ROYKSTOVAN


Sum nevnt hevur langhúsið, ið starvar heilt frá tíðliga í víkingatíð, verið ein rúmligur og byggilistarligur íblástur í verkætlanini. Harafturat kunnu vit ikki bæra okkum fyri at hyggja at eini nútímans útbygging av Setrinum í søguliga ljósinum frá roykstovuni sum aldargamal karmur um mentanarburð og sum lærumiðstøð. Tað er ikki heilt skeivt at siga, at føroyski skúlin í øldir hevur verið útintur fyrst í langhúsinum, síðan í roykstovuni, inntil hann seinastu hálvtannaðhundrað árini hevur verið fyri stórum broytingum og menning til tað, hann er í dag. Somuleiðis eru tað søgufrøðingar, sum meina, at roykstovan, sum vit kenna hana frá størru gørðunum í Føroyum fram til 19. øld, er beinleiðis slektað við stóra rúmið í langhúsinum frá víkingatíð; rúmið, har alt innandura virksemi fór fram kring langa eldstaðin, og har sovið varð úti undir væðingini framvið langvegginum.
Sum áður nevnt eru tað helst fleiri, ið vildu sagt, at tað er ikki tørvur á at innskriva eina verkætlan í nakran samanhang, annað enn at fylgja einum altjóða ráki og einum lýstum tørvi her og nú. Her eru vit av eini heilt aðrari fatan. Og tess meira, vit hava arbeitt við verkætlanini, tess meira gevandi hevur tað verið at leita inn í hendan søguliga alheim í eini roynd at finna ein mátt, ið kundi beina okkum á eina leið og vera við til at byggja eitt poetiskt fundament undir skapanini av einum byggilistarliga slóðbrótandi universiteti við nútímans føroyskum samleika, sprottin úr føroyskum jørðildi.

ÚTIØKIÐ


Byggingin av felagsbygninginum til Kampus er fyrsta byggistig í eini longri tilgongd at menna framtíðar Kampus millum Frælsið og Debesartrøð.
Í hesum fyrsta byggistigi verður bygt í Nóatúni, millum grønu fløtuna á Frælsinum og Debesartrøð.



LM-071/2023


V.U.HAMMERSHAIMSGØTA
FØROYAMÁLSDEILDIN
DEPESARTRØ
LANDSBÓKASAVNIÐ
J.C. SVABOSGØTA
HANDAN Á
UPPHVØRKI 1. BYGGISTIG
NÓATÚN
HØVUÐSINNGONGD
FRAMTÍÐAR BYGGISTIG
HORNABØ
FØROYA FÓLKAHÁSKÚLI
NIÐURKOYRING TIL KØMANDI P-KJALLARA
Yvirlitsmynd 1:1000


LM-071/2023



Tekjamynd : Nýggj felagsbygningurin á Kampus Frelsi

LM-071/2023

LM-071/2023



Teldamynd : Setrið sum ein vitamarvarði við útsýni yvir býin

LM-071/2023

SKIPAN AV ØKINUM

Við staðsetingini av felagsbygninginum verða í høvuðsheitum trý sjálvstøðug útiøkir skapt kring bygningin:

- Grøna fløtan á Frælsinum/við gamla Venjingarskúlan
- Vardi garðurin í Nóatúni
- Grøni skráin móti Debesartrøð og J.C. Svabosgøtu

Hesi trý høvuðsøkir vera bundin saman við grønum uttandura gongu- og súkkluleiðum. Eitt av meginhugskotinum við Felagsbygninginum er, at hann hevur inngongdir frá øllum trimum økjum, meðan fjórða inngongdin er frá vegnum Handan Á beint norðanfyri. Inngongdirnar eru bundnar í innandura krossmyndaðu høvuðsgøturnar, ið leiða til Torgið í Felagsbygninginum.

GRØNA FLØTAN Á FRÆLSINUM

Í hesum 1. byggistigi í nýggjari tíð vera 50-60 parkeringspláss í Nóatúni burtur. Harafturat kemur parkeringstørvurin til Felagsbygningin. Vit ganga út frá, at tað ikki ráðiligt at fremja parkeringina undir jørð á grasfløtuni á Frælsinum, fyrr enn farið verður undir bygging á fløtuni í einum seinni byggistigi. Bygningur og p-kjallari muga loysast samstundis, so berandi prinsipp verða stemmað av. Tí taka vit støðið í at fløtan (ella ein partur av henni) fyribils verður nýtt til parkering til Setrið, inntil endaliga loysnin verður framd við parkeringskjallara. Vit kenna ikki tilfarið í fløtuni, og hvussu væl hon er drenað, men um til ber, so kundi fløtan verið áløgd beinleiðis við armeringsmáttum, soleiðis at gróðurin varð partvís varðveittur, og fyribils parkeringsøkið var grønt summarhálvuna. Hetta er tó nakað, ið má kannast nærri, áðrenn endalig støða verður tikin.

Útgangsstøðið er, at fimleikahøllin á Námsvísindadeildini (ið summi kenna betri sum gamla Venjingarskúlan) verður tikin niður, áðrenn Felagsbygningurin verður tikin í nýtslu. Tó er bygningurin staðsettur leysur av fimleikahøllini, so báðir bygningar kunnu vera standandi eitt tíðarskeið um neyðugt.

Ein nýggjur vegur – ein tignarlig grøn allé við vøkrum viðarvøkstri framvið – verður gjørd av Frælsinum oman móti nýggju høvuðsinngongdini í Felagsbygninginum. Vegurin fer at liggja á útnyrðingssíðuni á fløtuni, framvið gamla Venjingarskúlanum. Verandi parkeringsøkið við gamla Venjingarskúlan verður varðveitt, men syðra innkoyringin verður flutt til tann nýggja atkomuvegin fyri at avmarka frákoyringarnar frá vegnum á Frælsinum.

NÓATÚN

Økið er í dag randað við tveimum vinkul-bygningum: Vinnuháskúlanum og í syðra bygninginum Havstovan og Setrið. Túnið hevur í dag eitt U-skap, men eftir útbyggingina við Felagsbygninginum verður tað eitt grønt, lívdargevandi torg í Nóatúni, ið er vart frá øllum ættum. Tó verða tríggjar smáar smogur til fólk til gongu og á súkklu, og gjørligt verður framvegis at koma við bili til eitt minni p-øki við Vinnuháskúlan. Í túninum er ein minni "fyribils" bygningur bygdur seinni í tíðini. Vit skjóta upp, at hesin bygningur verður tikin burtur, tá Felagsbygningurin er bygdur, fyri at skapa eitt vart, tignarligt torg við framúr góðum sólargangi, nógvum viðarvøkstri og møguleikum fyri uttandura uppihaldi frá matarhøll og felagsøkjum í nýggja bygninginum.

Vit skjóta upp at leggja størra partin av nýggja Nóatúni nakað hægri enn p-økið við Vinnuháskúlan við eini stórari, tignarligari sititrappu upp á torgið. Torgið kann nýtast til alskyns uttandura uppihald frá matarøkjum og øðrum felagsøkjum, samstundis sum túnið hevur sera gott samband við Nóatún-inngongdina til Felagsbygningin og til grøna økið niðan ímóti Frælsinum. Beint frammanfyri Felagsbygningin er ein uttandura sititrappa og rampa til súkklur og rørslutarnaði, ið gevur eitt gott samband oman á eitt lægri tún frammanfyri kantinuna í Felagsbygninginum. Her eru sera góðir uppihaldsmøguleikar við góðum sambandi millum inni og úti. Frá hesum túni er somuleiðis samband oman móti Debesartrøð og J.C. Svabosgøtu eftir einari grønari náttúrurás.




Diagram: Tað grøna verður drigið heilt innat bygninginum, og gerst ein integreraður partur bæði innandura, uttandura og á fasadunum

DEBESARTRØÐ

Útgangsstøðið fyri alt økið oman móti Debesartrøð er at varðveita so stóran part av tí sum yvirhøvur gjørligt. Ein stórur partur av tilgongdini og skapanini av bygninginum hevur tikið støði í at varðveita vakra og serstaka lendið, samstundis sum vit hava ynskt at fáa lendið heilt "inn í" bygningin, soleiðis at eyðkenda lendið gerst ein stórur partur av samleikanum inni í teimum mest almennu økjunum í Felagsbygninginum.

Í skjøldrinum oman ímóti Landsbókasavninum er Debesartrøð-inngongdin staðsett. Við einfaldum eyrgøtum vera ymisku Seturs-funktiónirnar á Debesartrøð, Landsbókasavnið við J. C. Svabosgøtu og økið við Vinnuháskúlan bundnar saman við Felagsbygningin. Ein botaniskur urtagarður liggur norðanfyri Felagsbygningin; tað vil siga í syðra enda á Debesartrøð. Seinnu árini sær botaniski urtagarðurin tó út til at vera meira ella minni burtur, men um so er, at tað er áhugi fyri at endurstovna hann, kann hetta økið gerast eitt sera spennandi og upplivingarríkt gróðrarøki, ið bókstaviliga kann renna heilt inn í framtíðar hjartað á nýggja Felagsbygninginum á Setrinum.

Skjøldurin oman ímóti Landsbókasavninum er soleiðis háttaður, at hann skal gerast ein ímynd av nýggja Setrinum á heyginum oman móti miðbýnum. Samstundis skal tað tó í framtíðini verða ómakaleyst at binda Felagsbygningin saman við Landsbókasavninum, um tørvur verður á tí.

Skjøldurin oman móti Landsbókasavninum, er soleiðis háttaður at hann skal gerast ein ímynd av 'nýggja' Setrinum á heyginum oman móti miðbýnum, men samstundis skal tað vera ómakaleyst í framtíðini at binda Felagsbygningin saman við Landsbókasavnið, um tørvur verður á tí.




Diagram : 1. Byggistig




Diagram: Fult útbygt kampus

FELAGSBYGNINGURIN

Í hesum uppskoti hava vit í øllum lutum raðfest at skapa ein savnandi bygning mitt í Kampus. Ein Felagsbygning, sum savnar ein stóran part av teim felagsfunktiónum, ið koma at mynda Setrið í framtíðini. Her skulu øll starvsfólk, lesandi og vitjandi kenna seg vælkomin í eitt livandi og kveikjandi lestrar- og granskingarumhvørvi. Vit hava lagt dent á nøkur høvuðsevni:

- Vit arbeiða við fleksibiliteti, har tað er gjørligt, soleiðis at fleiri av meira almennu økjunum ikki eru ov absolutt, men heldur meira "flótandi" við at tey kunnu tillagast og vera broytilig eftir tørvi. Summi "bert" við innbúgvi og mátanum, tey kunna nýtast; meðan onnur, sum til dømis stóri fyrilestrasalurin, á meira framkomnan hátt við flytiveggjum, flytførum stólapallum og líknandi.
- Á hesum stað ynskja vit ikki ein bygning, ið letur seg aftur um seg sjálvan við einum innanvendum atrium. Hinvegin ynskja vit ein bygning, ið bjóðar nær- og fjarumhvørvinum innar; hetta er liður í strembanini at skapa ein nýggjan, livandi býling við egnum samleika, mitt í høvuðsstaðnum.
- Vit ynskja í øllum lutum at leggja okkum eftir at náa allarhægstu burðardyggu málum – bæði viðvíkjandi tilfarsnýtslu, bygging, sosialum karmum inni og úti og viðvíkjandi kostnaði.
- At skapa ein bygning við allarhægstu byggilistarligu dygd, samstundis sum kostnaðurin er í tryggum karmum. Ein arkitektonisk dygdarbygging, ið loysir nýtslutørvir á hægsta stigi, samstundis sum byggilistin sprettir úr einum lokalum íblástri, ið kann sigast at vera upprunafundamentið undir føroyska samfelagnum heilt afturí frá landnámstíð.


(Meira útgreina niðanfyri og fremst undir Visjón - Arkitektonisk hugsjón og dygd)

ÍBLÁSTUR OG SØGULIGAR TILVÍSINGAR


Sum nevnt í "Arkitektonisk hugsjón og dygd", so meta vit, at tað hevur stóran týdning, at arkitektoniska ambitiónin hevur eitt hægri – ella eitt eyka – mál afturat øllum málum nevnd omanfyri um karmar, kveikjandi umhvørvi, burðardygd og so framvegis. Hetta málið er at innskriva hetta bygningsverk í ein meira yvirskipaðan siðsøguligan samanhang, samstundis sum bygningurin hevur nútíðar dám á altjóða støði.

Viðvíkjandi skipan av "bygninginum" í grannalagnum og lendinum hava vit, sum áður greitt frá, tikið støðið í tí aldargamla føroyska býlinginum. Tað er við útgangsstøði í og íblástri frá hesum, at vit hava skipað innanhýsis samansetingina av bygningslonum – við innvikum, smáum túnum við lívd, smogum millum bygningarnar, ymiskum støddum á húsum inni og úti og við relatión til lendið og grannahús.

Sum nevnt eru tað umstøður og kveikjandi karmar hjá lesandi og starvsfólki, ið koma í fyrstu røð og skulu verða teir allarbestu í heiminum. Tá hetta er sagt, so ynskja vit sum nevnt at arkitektoniska ambitiónin skal spretta úr eini lokalari siðvenju. Í góðari byggilist eru tað í flestu førum fleiri træðrir av íblástri, ið vera spunnir saman til eitt byggilistarligt hugskot; hesum hava vit eisini lagt okkum eftir í hesum føri. Ein av hesum træðrum, ið vit hava nýtt sum kveikjandi mátt og íblástur, er langhúsið frá víkingatíð; allarhelst nakað av tí allarfyrsta, ið er bygt í Føroyum, og sum á ein hátt kann sigast at vera eitt upprunafundament undir sivilisatión her á klettunum. Í sjálvum sær er tað ein vøkur poetisk mynd, at tað er ein byggilistarligur tráður spentur beinleiðis frá landnámstíð til tann førandi lærustovnin í nútíðar samfelagnum í Føroyum. Onki langhús er varðveitt í upprunalíki í Føroyum, men norðurlendska langhúsið sum snið er lutfalsliga væl lýst. Hetta snið – sjálvandi í einum heldur større skala enn upprunaliga – hevur eitt stórt potentiali sum íblástur og visjón til ein samtíðarbygning við hægstu byggilistarligu og burðardyggu góðsku.



Prinsippskurður: Langhús frá Víkingatíðini



Mynd: Siðbundin føroysk roykstova

LANGVEGGIR/ÚTVEGGIR

Í okkara uppskoti hava vit á ytru langveggjunum arbeitt við einum massivum útveggi, sum sjálvandi hevur vindeygu, har ið dagsljós krevst. Veggurin er bygdur upp sum ein lættur veggur, ið kundi staðið sum ein vanligur útveggur við til dømis timburklæðing ella líknandi. Í hesi verkætlanini skjóta vit upp at arbeiða við einum livandi útveggi við føroyskum vøkstri, har partar eisini eru vetrargrønir. Hetta verður gjørt við at stilla upp undanframleidd gróðrar-elementir á langveggirnar. Vit hava nýtt hesi prinsipp í øðrum verkætlanum, og í stuttum eru tey bygd upp við eini Corten-stálplátu við holum uttast, meðan innanfyri er ein gróðrarmátta, har plantur kunna veksa. Í gróðrarmáttuni liggja KT-stýrdar leiðingar, ið leiða vatn og tað til planturnar, sum við tíðini vaksa út ígjøgnum holini og skapa ein livandi grønan vegg, ið skiftir yvirbrá eftir árstíðini. Nógv menning hendir á økinum, so um verkætlanin hevði verið framd um nøkur ár, hevði verið gjørligt at tillaga prinsippið, soleiðis at nýggjasta vitanin til ta tíð verður nýtt sum grundarlag. Prinsippið kundi somuleiðis verið útgangsstøðið fyri spennandi verkætlanum innan lívfrøði, KT og aðra tøkni.

Langveggirnir í langhúsunum hjá okkara forfedrum hava upprunaliga verið bygdir av lokalum, stakkaðum flagi og laðaðum gróti. Hetta fyri at skapa ein massivan sterkan langvegg at seta løttu timburkonstruktiónina ímillum. Á "flag-vegginum" hava gras og lokalar plantur vaksið, soleiðis at veggurin uttanífrá helst hevur sæð út sum ein grønur múrur.

TIMBUR KONSTRUKTIÓNIN

Ímillum teir lutfalsliga "tungu" og meira afturlatnu ytru langveggirnar nýta vit eina timburkonstruktión gjørda úr burðardygt framleiddum timbri. Hendan konstruktión er yvirskipaða berandi prinsippið fyri øll dekk, veggir og yvirtrom. Veggir og dekk undir jørð og nakrar stabiliserandi kjarnur vera betong, annars vera allir veggir og dekk í útgangsstøðinum timbur-elementir (løtt lokal framleidd timburelement ella CLT (cross-laminated timber). Útgangsstøðið er, at so nógv sum gjørligt av timburkonstruktiónini og timburelementunum vera sjónlig í bygninginum.

Yvirskipað er timburkonstruktiónin deild í tríggjar sonur. Í so at siga øllum almennum økjum í húsinum verður opið upp í tróðrið, og dagsljósi streymar niður úr erva í mið-sonuni. Í mið-sonuni er eisini innandura gøtan, ið bindir allan bygningin saman og leiðir til sjálvt mið-Torgið, ella atrium, ið verður hjartað í framtíðar Setrinum. Somuleiðis bindir gøtan øll grannaøkini í Kampus saman umvegis tær fýra inngongdirnar til Felagsbygningin. Tað er í gøtuni og framvið henni, at tær almennu og mest livandi funktiónirnar í bygninginum eru staðsettar. Tað er her, ymisleikin spennir seg út, spennandi hugskot verða fødd, og eitt kveikjandi umhvørvi verður ment.
Tær báðar síðu-sonurnar framvið ytru langveggjunum eru heldur meira privatar og friðarligar. Her eru umstøður til hugsavnan; her er undirvísingar- og skrivstovuumhvørvið er staðsett.
Um vit aftur her taka eina samanbering við gott og væl túsund ára gamla langhúsið, so var mið-sonan fyrst og fremst til felagsarbeiði við eldstaðin og opnum ljóara í erva, har roykur slapp út og dagsljós inn. Her – framvið og í mið-rúminum – hevur mann longu vetrarkvøldini arbeitt og sagt frá søgum, meðan mentanararvur hevur verið borðin frá ættarliði til ættarlið.

Báðumegin mið-sonuna – framvið teimum tungu útveggjunum – vóru tvær meinlíkar síðu-sonur. Eftir øllum at døma hava hesar sonur ofta havt timburgólv, ið hevur verið lyft upp frá moldgólvinum. Í teimum størru húsunum, har størri familjur hava búleikast og í summum førum kanska fleiri familjur undir sama taki, hava hesi økini framvið útvegginum allarhelst verið meira privat; her hava einstaku familjurnar trekt til bakar.


.

FUNKTIONALITETUR

Tað eru fýra inngongdir í Felagsbygningin: ein á hvørjari síðu og ein í hvørjum enda á Felagsbygninginum. Av hesum fýra síggja vit inngongdina í skjøldrinum ímóti Frælsinum sum høvuðsinngongd (Hædd 0). Ein tignarlig allé við viðarvøkstri fer at leiða frá Frælsinum oman til eitt nýtt, vakurt torg framman fyri høvuðsinngongdina. Tá p-kjallari í framtíðini verður gjørdur undir grønu fløtuni á Frælsinum, verður somuleiðis ein inngongd beinleiðis frá p-kjallaranum til Felagsbygningin á hædd -1, beint undir inngongdini á hædd 0.


Allar fýra inngongdir (umframt tann fimta frá framtíðar P-kjallaranum) leiða beinleiðis inn á høvuðsgøtuna í Felagsbygninginum. Yvirskipað kann høvuðsgøtan síggjast sum ein krossur, sum bindur saman allar fýra inngongdirnar og harvið alt Kampus. Mitt í Felagsbygninginum – í økinum, har gøturnar krossast, og grønu útiøkini vera drigin inn í bygningin – er lívliga hjartað í bygninginum, Torgið. Her spennir almenna rúmið somuleiðis ígjøgnum allar hæddir í bygninginum. Kring hetta rúm liggja flestu av meginfunktiónunum í Felagsbygninginum, meðan heldur meira privat økir til skrivstovur og líknandi í útgangsstøðinum liggja í meira friðarligum økjum, longri burtur frá sentrala Torginum.

Útgangsstøðið er, at ymisku lestrarplássini finnast í so at siga øllum bygninginum; at lestrarplássini eru avbera fjølbroytt og liggja í sera ymiskum umhvørvum, frá tí heilt lívliga til tað heilt privata og friðarliga. Á ein hátt eru tað hesir óformligu lestrarmøguleikar, ið skapa eitt slag av grundtóna ella huglagi í øllum Felagsbygninginum. Lestrarplássini finnast allastaðni – frá plássum mitt á sititrappuni, á eini balkong við útsýni niður í gøtuna, inni í einum matarkróki, í einum friðarligum bólkarúmi undir væðingini ella uttanfyri í einum grønum sólkróki við lívd.



Konstruktiónsprinsipp

LM-071/2023



Teldumynd: Bókasavnið í neðra og bókakaffið í efra við gáðum útsýni annan í hvín

LM-071/2023

SKIPAN AV BYGNINGI

Sum nevnt tekur innandura skipanin av Felagsbygninginum útgangsstøðið í innandura gøtuni, har allar funktiónir í Felagsbygninginum liggja framvið sum hús framvið fjálgu bygdagøtuni, við sólarljósi stroymandi niður í gøtuna úr erva. Gøtan bindur allar fýra høvuðssíðurnar av bygninginum og grannalagnum saman og leiðir inn í sjálvt hjartað á Felagsbygninginum: høvuðsbýlings Torgið ella atrium, har allar meginfunktiónir liggja tætt við.

Á niðastu hæddunum, javnt við lendið, liggja tey meira almennu og lívligu økini við samspæli millum ser-funktiónirnar og gøtuna – at kalla sum smáir handlar og kaffihús í einum býi. Her er lívligt við eini skiftandi og óformligari samvirkan, alt eftir hvat fyriferst í húsinum. Á ovaru hæddunum er heldur friðarligari, og funktiónirnar framvið gøtuni eru á svalum, á smáum pallum ella í rúmum, haðani lívið í gøtuni kann eygleiðast og njótast eftir tørvi. Um leitað verður eitt sindur burtur frá gøtuni og Torginum, finnur tú tey meira friðarligu, afturlatnu undirvísingarrúmini og starvsfólkaøkini. Harafturat hava vit lagt okkum eftir at leggja óformlig lestrarpláss og bólkarúm so at siga í øllum bygninginum; hesi eru staðsett framvið gøtuni, á Torginum og í meira friðarligum økjum í bygninginum, soleiðis at tey nøkta ein breiðan tørv frá meldrinum á Torginum til lítla friðarliga krókin undir væðingini.

TORGIÐ

Hetta er hjartað í Felagsbygninginum. Her er sentrala, óformliga møtisstaðið; her kunnu framsýningar vera, her fara fram alskyns samlingar, her kann ein eyðkendur lestrarfriður valda uppundir prótøku, og somuleiðis kann bassurin runga eitt veitsluvikuskifti.

So at siga allar meginfunktiónir liggja uppat Torginum:

- Lestrarpláss – mitt í Marknaðarhøllini, í kaffistovuni, framvið gøtuni, í bólkarúmunum o.s.fr.
- Sentrala, opna trappan.
- Fyrilestrasalurin – har allur veggurin kann opnast út til Torgið.
- Stóra sititrappan út til "friðaða" upprunagarðin, har lesandi reika út og inn í sólsetrinum.
- Ein kjarna í fleiri hæddum mitt á Torginum, við lestrarplássum á pallum, innvikum og í bólkarúmum.
- Stóra kantinan við stórum sjálvtøkuøki.
- Marknaðarhøllin við ymiskum matarklivum, kaffihúsi og fíggjadagsbarr v.m. (Marknaðarhøllin er fleksibul og kann við flytiveggjum broytast til framsýningar, veitslur, fyrilestrar, foyer hjá fyrilestrarsalinum o.s.fr.).
- Bókasavn og lesisalur.
- Bókakafé.
- Lestrarskrivstova og -vegleiðing.
- Grøn útiøkir við lívd og góðum sólargangi allar tíðir á degnum.

FYRILESTRARSALURIN Miðskeiðis í Felagsbygninginum á hædd 0 og +1 liggur stóri Fyrilestrarsalurin. Langsíðan er gjørd við flytiveggjum, so allur salurin kann latast upp út ímóti Torginum. Tað vil siga, at salurin og Torgið kunnu samvirka til ymisk tiltøk; eitt sindur sum vit kenna tað frá Norðurlandahúsinum við salinum og Klingruni. Herumframt hava vit lagt okkum eftir, at salurin skal vera tignarligur; ein stoltleiki á Setrinum við góðskutilfarið og allarfremstu tøkni. Saman við fleksiblu møguleikunum í Fyrilestrarsalinum, Torginum og fleksibla Matmarknaðinum verður hetta uttan iva bestu karmar um ráðstevnur í landinum.

Salurin er rætthyrntur fyri at tryggja, at hann er so fleksibul sum gjørligt. Salurin er 6-7 metrar høgur og útgjørdur við fýra flytførum teleskop-stólapallum, ið kunnu parkerast í innvik á langvegginum ella nýtast til alskins uppsetingar, alt eftir tørvi. Harafturat hevur salurin eitt stórt tal av ljóðbjálvaðum flytiveggjum, ið somuleiðis kunnu parkerast í rúm/innvik á langvegginum ella vera nýttir til at deila rúmið upp í tvey, trý, fýra ella fleiri smærri rúm, alt eftir tørvi. Loftið í salinum hevur innbygdar skinnarar pr. 1,5 metrar í báðar ættir, soleiðis at staðsetingin av flytiveggjum er so fleksibul sum yvirhøvur gjørligt.

Sjálvt um salurin liggur lutfalsliga mitt í Felagsbygninginum, hava vit lagt okkum eftir at fáa uttandura dygdir inn í salin. Í landnyrðingsskjøldrinum á salinum, oman móti miðbýnum, liggur framúr vakra upprunalendið, ið vit hava lagt stóran dent á at varðveita. Her hava vit sett eina glasfasadu í endaveggin, ið tryggjar útsýnið til eitt framúr vakurt lendi og við miðbýnum, Tinganesi og Vestaru Vág í baksýninum – allarhelst eitt framtíðareyðkenni fyri Setrið. Vit eru vælvitandi um, at salurin helst í mongum førum skal nýtast við myrkalegging, og tað er sjálvsagt eisini gjørligt, men seinnapart á degnum og á kvøldi, tá sólin ikki skínur á glasfasaduna, er saktans gjørligt at nýta salin til eina røð av tiltøkum uttan myrkalegging.

Kring salin eru fleiri stuðulsfunktiónir, so sum goymslur til leysar stólar og borð, tøknirúm til ljóð og ljós, tulkarúm til ráðstevnur, svalar, har atgongd fæst til ovara part av stólapallum o.s.fr.

MATARSTØÐ

Á hædd -1, miðskeiðis í Felagsbygninginum, verður stórkøkur við øllum tilhoyrandi stuðulsfunktiónum. Køkurin hevur gott samband við vørumóttøkuna, beint sunnanfyri verandi setursbygning í Nóatúni. Gjørligt verður ótarnað at fáa allar vørur inn og út á hædd -1, uttan koma ígjøgnum nakað alment øki í Felagsbygninginum, har vanligi brúkarin kemur.

Somuleiðis á hædd -1, beint við køkin, liggur Kantinan, ið er størsta matarhølið. Eitt vakurt, rúmligt høli við opið upp í tróðrið og við beinleiðis sambandi við útiøkið, sum er eitt lívdargevandi, grønt tún við framúr góðum sólargangi. Matarsjálvtøkuøkið liggur beint uttanfyri stórkøkin í beinleiðis sambandi við Kantinuna.

Á hædd 0 liggur stóra fleksibla Marknaðarhøllin við rúmligum sambandi og opnari trappu niður í Kantinuna. Í Marknaðarhøllini eru ymisk smærri matarstøð og kaffiøkir staðsett. Tankin er, at hesi støð liggja beint omanfyri stórkøkin, so møguleiki er fyri at veita ymiskar tænastur umvegis matelevator frá stórkøkinum til hesar matbásar, um tørvur verður til tess frá einum rakstrarsjónarmiði. Tankin er, at ein ella fleiri av hesum básum kunnu nýtast til fríggjadagsbarr, tá tørvur er á tí. Harumframt er Marknaðarhøllin eisini hugsað fleksibul við einum ávísum tali av flytiveggjum, ið kunna nýtast til at deila rúmið upp til ymiskar tørvir, sum til dømis ymiskar "smærri matstovur" í Marknaðarhøllini, til óformell fyrilestrarøkir, til undirvísingarrúm undir serligum umstøðum o.s.fr.

BÓKAKAFE

Syðst í bygninginum á hædd -1 liggur bókakafein, ið eisini hevur sína egna lítla køk. Kaféin er partur av felagsøkinum, men liggur kortini í útjaðaranum. Her er vítt til veggja, opið upp í vakra timburtróðrið, men heldur friðarligari enn inni í sjálvum hjartanum. Her kunnu besta kaffið og leskiligastu køkurnar njótast, og ikki minst so kann fría útsýnið omanyvir miðbýin og Vestaru Vág njótast – ein hugnalig kafé við besta útsýninum í Havn.

Bókasavn

Á hædd -2, beint undir Bókakaféini og Kantinuni og við beinleiðis rúmligum sambandi millum hæddirnar, liggur Bókasavnið. Við Bókasavnið er inngongd, ið skapar framúr gott og tætt samband við Landsbókasavnið.

Her er alt, sum bókasavninum tørvar: bókasavnstænasta, lestrarpláss til tann einstaka, lestrarklivar, smærri ljóðbjálvað bólkarúm, nóg mikið av reolum, vesir, goymslur og líknandi. Her kanst tú hugsavna teg, samstundis sum tú kanst njóta eitt framúrskarandi útsýni yvir miðbýin, Tinganes og Vestaru Vág.

Hædd	Funktión	Bruttо	Nettо
2			
	ALMENT	264,93	248,15
	FYRISITING	499,88	462,98
	RAKSTUR	82,22	70,81
	UNDIRVÍSING	357,85	332,88
1			
	ALMENT	174,50	169,34
	FYRISITING	418,11	373,82
	RAKSTUR	98,45	83,36
	UNDIRVÍSING	751,01	677,09
0			
	ALMENT	1.011,24	949,91
	FYRISITING	298,96	258,40
	RAKSTUR	137,00	116,60
	UNDIRVÍSING	692,18	626,12
-1			
	ALMENT	627,94	576,46
	RAKSTUR	1.209,39	1.047,43
	UNDIRVÍSING	241,77	210,25
-2			
	ALMENT	540,80	498,59
	RAKSTUR	206,30	168,12
	UNDIRVÍSING	261,70	221,12




Diagram: Rúmyvirlit

UNDIRVÍSING

Í alt eru níggju vanlig undirvísingarhølir. Hesi hava ymiskar fleksiblar møguleikar við samanlegging av hølum eftir tørvi; til dømis í samband við prógtøkur, verkætlanir og líknandi. Hølini hava eitt skap, sum tryggjar so fría nýtslu og uppseting av inventari sum gjørligt. Súlur og líknandi eru staðsett soleiðis, at hesi ikki órógva í mun til at gera smávegis broytingar í framtíðini. Somuleiðis eru hølini fyrireikaði soleiðis, at tað er lætt at broyta og leggja nýggja tøkni inn, so hvørt tørvurin broytist, og menning fer fram á økinum. Útgangsstøðið er, at undirvísingarhølini eru lutfalsliga afturlatin ímóti felagsøkjunum, og í teimum fáu glasveggjum, ið vera nýttir, er gjørligt at draga fyri, um tørvur er á tí.

Yvirskipað kann sigast, at undirvísingarhølini liggja ímillum skrivstovuøkini og kjarnuøkið í Felagsbygninginum, uttan at verða órógvað hiðani. Hølini eru spjadd út á ymiskar hæddir, tvey við bókasavnið á hædd -2, tvey við sititrappuna á hædd -1, tvey við høvuðstrappuna á Torginum á hædd 1 og trý omaná Fyrilestrarsalinum á hædd 2. Øll undirvísingarhølir hava sera gott dagsljós, sum samstundis er stemmað av í mun til yvirupphiting av sólini, við møguleika fyri at draga fyri og við góðari luftskiftisskipan. Seks av undirvísingarhølunum hava beinleiðis atgongd til uttandura økir. Nógv ymisk óformlig lestrarpláss og bólkarúm eru í øllum teimum økjunum, har undirvísingarhølir eru.

SKRIVSTOVUØKIÐ

Í høvuðsheitum liggja økini hjá setursleiðsluni, fyrisitingini, deildarskrivstovurnar og tess stuðulsfunktiónir á teimum ovaru hæddunum, vestanfyri Torgið, burtur frá teimum mest lívligu økjunum í Felagsbygninginum. Tó er lestrarfyrisitingin, móttøka v.m. nærhendis høvuðsinngongdina frá Frælsinum. Skrivstovuøkið er lutfalsliga fjølbroytt samansett, við skrivstovum til 1, 2, 4, 6 og 8 fólk, og vit hava lagt okkum eftir, at økini í útgangsstøðinum eru so fleksibul sum gjørligt, soleiðis at tey kunnu lagast til skiftandi tørv.

Fyri at skapa eitt vælvirkandi skrivstovuøki er tað sera týdningarmikið at hava væl skipaðar og staðsettar stuðulsfunktiónir. Eyðsæð er sjálvandi at gera neyðugar funktiónir so sum kopirúm, goymslur, vesir og líknandi. Men fyri at skapa trivnað og eitt kveikjandi umhvørvi hava vit sæð tað sum sera týdningarmikið og sum ein sjálvsagdan part av skrivstovuøkinum at skapa óformlig, fjálg møtistøð, te-køkar, klivar til privatar samtalur eins og óformlig og formlig fundarstøð í ymiskum støddum til starvsfólkið. Afturat hesum eru fleiri møguleikar til at njóta útiøkir – m.a. er beinleiðis atgongd frá skrivstovuøkinum til eina stóra, grøna takterassu á hædd 2 inn ímóti Nóatúni, har starvsfólk kunnu njóta ein kaffimunn ella eitt óformligt prát í sólskininum uttan at vera beinleiðis partur av einum lestrarumhvørvi.

VIRKIS OG RØRSLU DIAGRAM

	Brutto	Netto
ALMENT	2624	2447
FYRISITING	1231	1108
RAKSTUR	1737	1491
UNDIRVÍSING	2296	2059
TILSAMANS	7.888	7.105


+2
- Undirvísingarhølir
- Bólkarúm og kovar
- Leiðsluskrivstovur
- Liðiligar skrivstovur

+1
- Undirvísingarhølir
- Bólkarúm og kovar
- Fyrisiting
- Svali á auditorium

0
- Lestrarvegleiðing og fyrisiting
- Bólkarúm og kovar
- Studio
- Auditorium
- Marknaðarhøll

-1
- Tøknirúm, goymsla, verkstaður v.m.
- Framleiðsluksekur og kantina
- Undirvísingarhølir
- Bólkarúm og kovar


-0
- Bókasavn og lesisalur
- Undirvísingarhølir
- Barnaski




LM-071/2023




Teikumynd: Frá hvuðsinngongini kemur man inn í eitt ljós og fjálgt felagsøki við útsýni igjøgnum bygningin.




Prótvøka




4 opin rúm




Ráðstevna/Hátíðarhald



Miðal fyrilestrarhøli og 2 opin rúm




Konsert/alment tiltak



1 miðal + 2 smá fyrilestrarhøli

Multifuntkionellur fyrilestrarsalur við flytiveggjum, sum gera at salurin ómakaleyst kann umskapast eftir høvinum.


BURÐARDYGD



Eins húsalonir settar saman til størri 'býlings-kroppar'.
Dagsljós verður leitt inn í kjarnuna við opum í tekjuni.

TILFARSVAL

Lokalt útvunnið tilfar til bygging er avmarkað í Føroyum. Tó er tað ein aldargomul siðvenja at nýta timbur til bygging her á landi. Fyri mongum árum síðani var hetta í høvuðsheitum sum rekaviður, og seinni í tíðini varð timbrið innflutt úr grannalondum. Eitt umhvørvi av timbri hevur jaliga ávirkan á fólk. Ein hugvekjandi kanning mátaði eina "sparing" av hjartasløgum hjá einum persóni á 8.600 hjartasløg hvønn einasta dag við at uppihalda seg í einum rúmi av timbri. Við støði í lokalum siðvenjum, menniskjaligari vælveru og høgum burðardyggum ambitiónum ynskja vit sum útgangsstøði, at Felagsbygningurin verður ein burðardyggur timburbygningur við høvuðskonstruktión og yvirtrom úr timbri. Allir veggir og dekk yvir jørð verða løtt, lokalt framleidd timburelementir, og/ella innflutt CLT-elementir.



FYRIMUNIR VIÐ TIMBURBYGGING

Timbur framleitt eftir burðardyggum leisti er ein sera umhvørvisvinarlig rávøra. Træ veksur í náttúruni, og undir vøkstrinum verður CO2 bundið í tilfarinum. Tá træ verður brent, eitt nú eftir at hava tænt fyri seg, so útleiðir tað sjálvandi CO2, men í mun til kol, olju og gass økir træ munandi minni um samlaðu vakstrarhúsárinini, tí kolevnið longu er í ringrás. Í stuttum kann sigast, at eitt timburhús minkar um útlátið av veðurlagsgassum við 30-70% í mun til stál og betong.

Í skjøldrinum á øllum bygningum nýta vit loddrøtt timburelementir, ið geva bygninginum eina heita tilfarskenslu, ið brýtur frá vanliga, "kalda" glasbygninginum. Harafturat hava loddrøttu timburelementini ovurhondsstóran týdning mótvegis yvirupphiting inni, við tað at tey skugga fyri beinleiðis sólargeislum stóran part av degnum. Í ávísum økjum í skjøldrinum, har vit ynskja frítt útsýni, hava vit opnar rammur, uttan loddrøttu elementini.

BYGGIHÁTTUR

Í hesum uppskoti mæla vit til, at arbeitt við einum sera einfaldum bygningsprinsippi, ið er samansett av EINI húsabreidd við sama lætta yvirskipaða konstruktiónsprinsippi. Hetta viðførir eina sera einfalda og effektiva bygging. Eftir at parturin, ið er undir jørð, er stoyptur upp, verður høvuðskonstruktión og sperrur settar upp. Harnæst vera tak-elementir og veggja-elementir sett upp.

Timburbygging kann vera sera fjølbroytt, og tað finnast nógvir framferðarhættir innan hesa bygging. Tó er felags fyri flestu framferðarhættirnar, at teir viðføra eitt munandi minni útlát enn nógv vanlig bygging í Føroyum í dag. Harafturat er elementbygging sera vælegnað í Føroyum, um arbeiðið verður væl skipað við framleiðslu innandura í vetrarhálvuni og uppseting á staðnum í summarhálvuni. Tí taka vit støði í, at alt yvir jørð eru løtt elementir framleidd úr burðardyggum tilfari, sum lokalt framleidd timburelementir ella sum innflutt CLT-elementir.

Vit ynskja, at nýggi Felagsbygningurin í øllum lutum skal raðfesta burðardygd uttan at slaka uppá góðsku av hvørki bygningum ella útiøkjum – vælvitandi at tílíkar visjónir og ætlanir skulu allýsast í tættum samstarvi við byggiharran. Tað finnast fleiri loysnir við byggilistarligari góðsku og einum munandi vinningi í skerdum CO2-útláti. Fyri tekjur taka vit støði í grønum tekjum; tað, vit vanliga rópa flagtekju. Hetta er tilfar, sum kann skaffast lokalt við ógvuliga avmarkaðum útláti, hóast onkrar konstruktiónir skulu styrkjast heldur meira enn við eini lættari tekju. Alt eftir hvør tekja annars hevði verið nýtt, so sær tað út til viðvíkjandi CO2, at ein flagtekja – í mun til flest allar aðrar loysnir – er sera umhvørvisvinarlig.

BURÐARDYGD

GRØNAR FASADUR

Menningarmøguleikarnir fyri burðardyggum loysnum við grønum fasadum eru fleiri. Í og við at Havnin veksur og gert tættari, gerast grønu økini færri. Við at nýta fasadurnar sum vakstrarøki, er møguligt at endurskapað ein part av mista vøkstrinum og harvið vaksa um margfeldi á staðnum, og samstundis betra um umstøðurnar hjá smáfugli og smákyktum at støðast ímillum húsini.


Sum útveggir á norður- og suðursíðuni skjóta vit upp at nýta ein "gróðrarvegg" við føroyskum vøkstri. Hetta verður gjørt við at nýta undanframleidd gróðrar-elementir sum klæðing uttaná langveggirnar. Vit hava nýtt hesi prinsipp í øðrum verkætlanum. Í stuttum hava vit í hesum føri bygt gróðrarelementini upp við eini Corten-stálplátu við holum uttast. Innanfyri er ein gróðrarmátta, ið er gjørd úr eini samanseting av natúrligum tilfari, sum sýgur vatnið og deilir tað javnt yvir allan veggin og harvið tryggjar neyðuga vætu og bestu vakstrarmøguleikar, soleiðis at planturnar kunnu spjaða røturnar og harvið skapa ein samanhangandi grønan vegg. Í gróðrarmáttuni liggja somuleiðis KT-stýrdar leiðingar, ið leiða vatn og tað til planturnar, sum við tíðini vaksa út gjøgnum holini í Corten-plátuni og skapa ein grønan vegg, ið áhaldandi skiftir yvirbrá eftir árstíðini.

Grønu fasadurnar gera – saman við flagtekjuni – at bygningur og lendið tykjast at vaksa saman, og bygningurin gerst ein integreraður partur av vakra, grøna umhvørvinum við Debesartrøð.

Grønu fasadurnar verða at kalla eitt plantulaboratorium, har framleiðsla og ymiskar kanningar kunnu vera ein integreraður partur av náttúruvísindinadeildini og møguligari KT-menning, samstundis sum endurskapti "botaniski urtagarðurin" á Debesartrøð kann samvirka við fasadunum, t.d. sum framleiðslustað av teimum plantum, ið skulu vaksa á fasadunum.

Plantusamansetingin á grønu fasadunum skal sjálvandi vera laga til staðbundna umhvørvið og føroyska veðurlagið. Føroyskar heimahoyrandi plantur og harðfør viðasløg, so sum arktiskur pílur, føroyskur baraldur og fjallafura verða plantað í fasaduelementini fyri at tryggja, at veggurin er grønur og vakur alt árið. Samansetingin av avblomstrandi plantum og vetrargrønum vøkstri skal vera 40 % vetrargrønt, 60 % leyvfellandi (staudur). (Meira kunning um Bgreen fasaduelementini er at finna á byggros.dk)

Ein áhaldandi menning fer fram hesum øki, so tá verkætlanin møguliga hevði verið framd um 2-3 ár, er væl hugsandi, at prinsippið og tøknin hevði verið rættað til soleiðis, at nýggjasta vitanin til ta tíð hevði verið nýtt sum grundarlag.



Skurður 1:50
Prinsipp skurður av uppbygnaði